# Vil hava at vita hvat ætlanin er við løgregluni í Føroyum

**Høgni Hoydal hevur nú spurt danska løgmálaráðharran um ætlanin er at halda fram við ætlanini at umskipa løgregluna í Føroyum og hann vil eisini hava at vita, um landsstýrið fær nakra ávirkan**

LØGREGLA
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Høgni Hoydal, fólkatingsmaður vil hava at vita frá donsku stjørnini um ætlanin at umskipa løgregluna í Føroyum nú verður tikin framaftur*

Høgni Hoydal, fólkatingsmaður, vil nú hava at vita frá donsku stjórnini, hvørjar ætlanir hon hevur við løgregluni í Føroyum.

Hann hevur tí á fólkatingi spurt danska løgmálaráðharranum, Lenu Espersen, hvussu verður vorðið við løgregluni í Føroyym í Framtíðini.

Tað hevur hann gjørt í einum skrivligum fyrispurningi til Lenu Espersen, sum hon sostatt skal svara í næstum.

Høgni Hoydal vísir á, at nakað síðani kom fram, at ætlanin var at broyta løgregluna í Føroyum munandi. Eitt nú var frammi, at bæði sýsluskrivstovur leggjast niður og fólk flytast

– Undanfarna landsstýrið heitti á donsku stjórnina um at steðga á við umleggingunum, tí ætlanin varð at yvirtaka løgregluna.

Men nú er ætlanin at yvirtaka løgregluna ere steðgað, sigur Høgni Hoydal og tí vil hann hava at vita, um danska stjórnin fer at taka ætlaðu umleggingarnar uppaftur og, hvørjar ítøkiligar ætlanir eru við løgregluni í Føroyum.

Ikki minst vil fólkatingsmaðurin hava at vita, um danska stjórnin kann veita vissu fyri, at landsstýrið fær ávirkan á ætlaðu umleggingarnar.

Høgni Hoydal reisti eisini spurningin nú ein dagin, munnligir fyrispurningar vóru fyri í fólkatinginum, men tá boðaði Lene Espersen frá, at hon var ikki før fyri at svara nágreiniliga uppá standandi fót og hon heitti á Høgna Hoydal um at seta fyrispurningin skrivliga og tað hevur hann so gjørt nú.

Høgni Hoydal heldur, at spurningurin er serliga átrokandi, nú løgmálaráðið hevur fingið uppskot um umfatandi broytingar í løgregluna í Danmark.

Men hóast lene Espersen ikki kundi svara spurninginum so nágreiniliga, visti hon kortini, at uppskotið um at broyta løgregluna í Danmark fer onga sum helst ávirkan á løgregluna í Føroyum.

Og fyri hana er tað ein púra natúrlig, politisk fortreyt, at broytingar skulu gerast í samráð við tey, sum tær ávirka

– Hetta má eisini verða útgangsstøðið í einum kjaki um famtíðina hjá løgregluni í Føroyum, segði Lene Espersen.

# Kanna møguleikarnar fyri at lata suðuroyingar sleppa til landsdyst

**Strandferðslan hevur fingið áheitan frá fótbóltsambandinum um at broyta ferðaætlanina hjá Smyrli og tað verður viðgjørt í løtuni**

FERÐAÆTLAN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Tá ið serlig tiltøk eru norðanfjørðs, hava suðuroyingar ein standandi trupulleika. Og tað er, at skulu teir taka lut, noyðast teir at gista í Havn eina nátt, tí ferðaætlanin hjá Smyrli liggur soleiðis, at vanliga slepst ikki norður og suður til eitt tiltak sama dag.

Hetta ger seg aftur galdandi, nú føroyingar spæla landsdystímóti Írlandi á Tórsvølli mikudagin 8. juni klokkan 19.30.

Men Smyril siglur suður klokkan 19, so skulu suðuroyingar síggja dystin, mugu teir liggja nátt í Havn.

Men nú hevur Fótbóltssambandið heitt á Strandferðsluna um at broyta ferðaætlanina, so at tað eisini skal bera til hjá Suðuroyingum at vera við á hesum tjóðardegnum, uttan at noyðast at gista í Havn eina nátt.

Kristian Davidsen, stjóri á Strandferðsluni, sigur, at Strandferðslan nú fer at viðgera áheitanina saman við Fótbóltssambandinum. Og hann lovar, at ein endalig avgerð skal vera tikin í góðari tíð áðrenn 8. juni.

## Bara í undantaksføri

Annars sigur Kristian Davidsen, at Strandferðslan fær javnan áheitanir um at broyta ferðaætlanina hjá skipunum.

– Tað ber ikki til at játta øllum áheitanum. Samstundis hevur tað víst seg at elva til stóra ónøgd, at nakrar áheitanir verða játtaðar og aðrar verða noktaðar. Tí heldur Strandferðslan, at tað best fyri heildina at skipini halda seg til ferðaætlanina.

Men Kristian Davidsen sigur, at onkuntíð hava skipini broytt ferðaætlanin í heilt serligum førum.

Hann sigur, at eitt dømi um tað var landsdysturin ímóti Fraklandi, tí hann varð mettur at verða av serligum áhuga fyri alt landið.

Annars spæla Føroya eisini landsdyst á Toftum leygardagin klokkan 16.30 ímóti Sveis, men í sambandi við tann dystin sleppa suðuroyingar aftur og fram sama dag, umenn at dagurin verður langur við tað, at leygardag siglur Smyril norður klokkan sjey á morgni og suðuraftur klokkan 20 á kvøldið.

Men tá er kortini ikki nógv tíð at geva av, skuldi ein bilur punktera ella okkurt annað ikki gingið eftir vild.

W W W . S O S I A L U R I N . F O